DAGSINS MEINING

Listarmaður níti

Ein av okkara størstu listamonnum, Janus Kamban, myndahøggari, fyllir 90 ár í dag. Janus Kamban er í mangar mátar ein ímynd av føroyskari list. Hann er millum teir fyrstu føroyingarnar, sum fáa sær útbúgving sum listaamaður. Hann var í mong ár við til at fyrireika og heingja upp ólavsøkuframsýningarnar, sum tá var stóra árliga hendingin innan føroyska list. Í eitt langt áramál var Janus eisini fyristøðumaður í Listaskálanum, eftir at tað var eydnast Listafelagnum at reisa skálan í Gundadali í 1970.

Samstundis sum hann samskipaði, fyrireikaði og líkasum var umboðsmaður fyri føroyska list, skapti hann listarverk, stór listarverk, sum prýða veggir, skjøldrar, garðar og friøki. Nøkur eru stór og monumental verk, og onnur fella friðarliga inn í vegg ella tað umhvørvi, tey eru sett í. Men alt eru stór listaverk í skapi og rúmd. Summi hava nakað klassiskt og stórbart yvir sær. Tey sýna heildir og fara ikki í smálutir, eru meistarlig og fullfiggjað í formi og skapi og sýna kanska ikki tær nógvu kenslurnar. Onnur eru meira lítillátin og eru ofta tikin úr dagliga lívi føroyingsins. Tey árini, Janus var í Danmark í 30-árunum, vóru byltingarár, og hann er ávirkaður av tí sosialrealistiska rákinum, sum tá var.

Høvuðsverkið hjá Janusi er óivað minnisvarðin, Móðurmálið, reistur til minnis um faðirin at føroyska skriftmálinum, W.U. Hammersheimb, undir gamla Landsbókasavninum um tað mundið, tá skriftmálið var 100 ár. Varðin varð avdúkaður í 1948 og røduna helt Janus Djurhuus. Eftir mynd frá hátíðarhaldinum at døma hevur hetta verið stórhending, sum kanska ikki er so løgið, tí tá vóru føroysku listaverkini, sum prýddu veggir og fríøki fá ella eingi. Eitt annað stórverk er Søgumaðurin á eysturskjøldrinum á Kommunuskúlanum í Havn. Eitt triðja er minnisvarðin yvir skaldið Jóan Petur uppi í Trøð í Kvívík.

Men umframt mongu verkini úr gróti, gipsi og øðrum evnunum, stoypt í bronsu, hevur Janus gjørt mong smærri grafisk verk. Hann hevur skorið nógv úr linoleum. Og hesi prentini, sum sýna krokandi seyðir, bátar og fólk á støðni, útróðrarbatin á ferð oman gjøgnum fjørðin, skip og bátar við bryggju, fuglar og skiftandi skýrák, eru kanska tey mest fólkakæru í list Janusar. Tað eru tey, sum eru at siggja í føroysku heimunum.

Ídag eru eisini 73 ár síðani, at tann 17 ára gamli havnardrongurin fór til Keypmannahavnar á listaskúla, har hann skuldi læra at tekna og mála, áðrenn hann søkti inn á myndhøggaraskúlan á Kunstakademinum. Í Keypmannahavn var hann - eitt ár undantikið - til eftir krígslok, tá hann kom heim aftur og gjørdist partur í tí listarliga umhvørvinum, sum tá tók seg upp.

Janus hevur ikki bara talað gjøgnum verk síni. Hann hevur sagt sína hugsan í skrivt um bæði æstetisk og politisk viðurskifti. Hann hevur talað at, tá viði eru farin fyri skeyti, og mælt til aðrar loysnir á sínum vælstoypta og vitborna máli. Politiskt hevur hann verið á vinstraveingi, og hann hevur frá fyrsta degi talað ímóti útlendska hervaldinum her á landi. Sum listarmaður hevur hann høgt seg inn í føroyska listaheimin, og verkini kring landið fara at minna fólkið, sum her býr, um ein góðan listarmann og fyrsta veruliga myndhøggaran her á landi. Listarverk, sum vit takka honum fyri. Hjartaliga tillukku og alt tað besta!

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Heilsan til Janus

Listafelag Føroya
Listasavn Føroya

Janus Kamban er miðdepilin í føroyskari myndandi list eftir seinna seinna heimsbardaga. Hann skipaði fyri framsýningum, eggjaði øðrum til, var vegleiðarin og álitið hjá heilum ættarliði av listafólki í Føroyum, í nógv ár fyristøðumaður fyri Listaskálan. Har hann var uppií, kundi tú vera tryggur, har var alt í góðum hondum. Hann setti stór krøv og var tað kritiska eygað í øllum arbeiði. Við hann bar ikki til at káva útyvir og tingast um listaliga dygd. Hann segði altíð sína hugsan klárt og beinrakið, men samstundis høviskliga.

Í øllum verkum sínum hevur Janus leitað eftir skapi, sum er sterkt og einfalt í senn. Hansara myndevni fram um annað er tað vanliga fólkið og gerandislív tess, lítillátað og uttan nakran háva, kortini við duldari megi og stórari fynd. Hansara verk er úrslit av drúgvum og áhaldandi vilja at finna inn til tað, sum er føroysk roynd og kensla og at bera tað fram í myndum loystum úr tíð.

Á hansara 90 ára degi takka vit Janusi fyri hansara stóra og áhaldandi arbeiði føroyskari list at frama.

Sandoyggin og Bill Justinussen

Rúni Hentze

Eftir at nakað av skriving hevur verið í bløðunum um læknaviðurskiftini í Sandoynni, hevur Bill Justinussen tikið samanum og latið okkum vita, hvørjar ætlanir hann hevur um at loysa trupulleikan. Nú eru hansara ætlanir ikki ókendar, tær komu til sjóndar í løgmansroðuni. Hóast víst var á, at fólkið her suðuri ikki fór at góðtaka hesa ætlan, tykist ikki sum landsstýrismaðurin ætlar at broyta kós.

Samfelagið er útbygt á øllum økjum hesi seinastu árini. Heilsuverkið er nógv útbygt, og ætlanir eru um stoðugar útbyggingum komandi árini. Men á einum øki ætlar landsstýrismaðurin at fara hinvegin og um ikki niðurleggja, so í hvussu so er skerja tænastuna munandi. Í 80 ár hevur lækni verið tøkur í oynni døgnið runt hvønn dag í árinum, men nú heldur landsstýrismaðurin, at ongin lækni nýtist at vera tøkur í økinum frá kl16 til kl 8 morgunin eftir og ei heldur í vikuskiftinum.

Tað er ringt at taka landsstýrismannin í álvara, tá hann heldur at hetta skulu fólk í Sandoynni lata sær lynda, tí á smáu oyggjunum og um borð í skipi eru heldur ongir læknar. Hann kundi skoytt uppí, at læknar eru heldur ikki við, tá menn fara burtur í haga og eru allan dagin frá húsum.

Nú eri eg ikki óvitandi um, at trupulleikar hava verið at uppihalda læknatænastuna í Sandoynni seinastu árini. Tvey læknastørv eru normerað til øki, og trupult hevur verið at manna hesi størv. Men fyri tað mugu vit ikki sleppa endanum og geva upp. Fyri tað um støðan í løtuni er trupul, kunnu viðurskiftini broytast. Tað tykist eisini, sum um man hevur læst seg fastan í ávísar loysnir og er bangin fyri at ganga nýggjar leiðir, tí uppskotini um loysn av málinum tróta ikki. Á evnisfundinum hjá útnorðurráðnum í Grønlandi í summar, har Bill Justinussen eisini var til staðar, var t.d. upplýst hvussu íslendingar hava loyst trupulleikan við læknavaktum uttan fyri viðtalutíð. Teir hava nevnliga boðið vaktina út í almenna lisitatión.

Loysnin sum Bill Justinussen skjýtur upp (men sum kanska ikki er hansara egna) er ein háðan móti fólkinum í Sandoynni. Hevði tað kanska verið hugsandi, at læknavaktin hjá havnarfólki sat á Sandi? At læknavakt er í Sandoynni er ikki nakað krav, so sum Bill Justinussen førir fram. Hetta er ein rættur sum fólkið her suðuri hevur havt í eini 80 ár. Og henda rætt vilja vit sjálvandi ikki missa,líka lítið sum vit høvdu góðtikið at "Borðoyarnes" aftur varð settur í rutu millum Skopun og Tórshavn! Sandoyggin er so afturútsigld á so at siga øllum økjum, at vit hava skyldu til at byggja upp, heldur enn at bróta niður.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Gudstrúgvin og nakni keisarin

Símun Absalonsen

Í Dimmalætting frá 27. aug. skrivar Høgni av Heiði áhugaverdar hugleiðingar um ævintýrið "Kejserens nye klæder" eftir H.C. Andersen. Hann samanber gudstrúnna hjá menniskjum við nakna keisaran, har tað góðvarna barnið sigur teimum vaksnu sannleikan: "Keisarin er nakin", ella í breiðari merking "tað er eingin Gud".

Lika síðani hetta ævintýrið varð skrivað í 1837 hevur bæði leikur og lærdur roynt at tikið ævintýrið til inntøku fyri bæði líkt og ólíkt. Men tá eg las greinina í blaðnum rann mær til hugs, at ateisma ella gudloysi er eisini eitt slag av trúgv. Henda religión hevur eisini sínar halgidómar og sínar heilagu lutir, ið eingin má seta spurnartekin við, tí so er atsóknin vís. Ein av gudleysu trúarjáttanum er at alheimurin er vorðin til av sær sjálvum, at lívið av fyrstan upprann av sær sjálvum úr ikki lívrunnum evnum, at kunning (informatión) á gátuføran hátt bleiv lagt inn á allar livandi kyknur (av sær sjálvum), at menning (evolutión) fór fram ígjøgnum milliónir av árum (av sær sjálvum) at alt design í náttúrini er komið av sær sjálvum, uttan formgeva ella verkstjóra - alt samalt er av reinari tilvild. Evangeliið hjá gudloysinum kann kanska lýsast í hesum orðum: -Í upphavi var einki, síðani sprongdist tað heila og á gátuføran hátt upprann kosmos, og menniskjað varð til av kosmiskari tilvild.

Tað stendur menniskjum frítt at seta sítt álit á ein slíkan "keisara", men her skal ikki so lítið av trúgv til, og hesin "keisari" er í eygunum á mongum hugsandi menniskjum bæði hattleysur og klútaleysur.

Náttúruvísund ella filosofi??

Í 1837, sama ár sum H.C. Andersen skrivaði ævintýrið um nakna keisaran, var bretin Charles Darwin á rannsóknarferð á Galapagosoyggjunum í Kyrra Havinum. Henda ferð gav íblásturin til bókina "The Origin of Species" sum kom út í 1859 og varð útseld beinan vegin. Her gevur Darwin sítt boð uppá hvussu hann metti, at lívið á jørðini hevur ment seg. Hetta var eitt ástoði (teori), sum vísindini seinni skuldu granska. Men teoriin varð stórliga fagnað beinan vegin. Hetta var ikki fyrst og fremst av vísundaligum ávum, men heldur vegna filosofiska rákið í Vesturheiminum. Týski filosoffurin Friedrich Nietzsche (1844-1900) leitaði til apurnar, tá gátan um eksistentialismu skuldi loysast. Samanuntikið kann sigast, at heimurin var búgvin at taka ímóti Darwin, tí tankar hansara vóru als ikki ókendir frammanundan. Og darwinisma bleiv ikki fyrst og fremst ein partur av náttúruvísindini, men heldur ein partur av filosofiini.

Tann gransking sum seinni fór fram var einvegis. Úrslitið var fastlagt frammanundan, nú skuldu prógvini finnast. Ikki minst í "svarta kassanum" skuldi útviklingslæran prógvast. (Alt organiskt lív er bygt upp av kyknum, og Darwin nevndi kyknuna "the black box" av tí at menniskjað í 1859 hevði sera avmarkaða vitan um hvat var í svarta kassanum.) Darwin metti, at tíðin fór at svara mongum spurningum og rætt hevði hann. Tað er ikki smávegis sum er komið fram í ljósið úr svarta kassanum.

Uppruni til lívið - ein herskin biti hjá darwinismuni!

Í dag vita vit, at sjálvt "einfaldar" kyknur eru so fjøltáttaðar, skipaðar og samansettar at lívið rópar eftir einum desingara. Alt lív (kyknur) er bygt upp av proteinum, sum aftur er bygt upp av ymiskum aminosýrum. Ein "einføld recept uppá einfalt lív" er henda: Í minsta lagi 400 aminosðrur skulu koblast í eina heilt ávísa raðfylgju - her hjálpir eingin tilvild - fyri at skapa eitt protein. At enda skulu í minsta lagi 124 proteinir til fyri at mynda tað minst hugsandi einfaldu organismuna. Men trupuleikin er størri enn so. Aminosðrur mynda ikki proteinir uttan víðari. Tað finnast tvey sløg av amonosýrum - livandi ella deyðar. Skal ein organisma vera livandi, eigur hon bert at innihalda livandi "byggisteinar" (L-aminosýrur). Tað er sum at kasta krónu og mynt 400 ferðir og fáa krónu hvørja ferð. Hetta skal endurtakast 124 ferðir. Hagfrøðin kann rokna møguleikan út. Møguleikin ella lutfallið er 1 í mun til eitt 1tal við 14.000 nullum aftanfyri. Hesi tøl eru so astronomisk, at sjálvt garvaðir matematikarar missa vitið. Kendi vísundamaðurin Lee Spetner, ið er professari í matematikk og fysik frá lærda háskúlanum í Mitchigan, og sum síðani 1964 nærum burturav hevur granskað lívfrøði, sigur í bók síni "Shattering the Modern Theory of Evolution", at tankin um at lív er upprunnið av sær sjálvum er matematiskt møsn.

Men trupuleikin hjá frumlívinum er størri enn bert fysiskt design. Henda frumkyknan hevur ongan møguleika at menna seg uttan kunning (DNA-informatión). Og sambært informatiónsvísindini hevur øll informatión ein avsendara. Og hvør man hava skrivað fyrsta forritið???

Myndir úr telduheiminum

Í telduheiminum skilja vit ímillum hard-ware og software. Tú kanst hava framúr nðmótast hard-ware (telduskýggja, knappaborð, printara osfr.) Men uttan software (data-information) er printarin ikki førur fyri at skriva so mikið sum eitt komma. Sama kann sigast um alt organiskt lív á jørðini.

Uttan eina vitandi kotu ella "heila" eru allar kyknur óvirknar.

Tá vísundini fyri 50 árum síðani varnaðist og fór at granska bio-informatión, fekk darwinisman ein stórran forkláringstrupulleika afturat, sum hon líka síðani hevur runnið undan, og dylur sum mansmorð fyri sínum studentum (pisur eta jú alt rátt). Darwin hevði eina materialistiska fatan tá talan var um upprunan til lívið, men av góðum grundum vitsti hann einki um informatiónstrupulleikan, sum sjálvsagt ikki letur seg forklára útfrá materialistiskari tilvild, tí informatión er ikki materiell og samband informatiónsvísindini er tað ein náttúrulóg, at øll informatión - eisini bio-informatión - skal hava ein avsendara.

Náttúrulógir mugu lúta fyri filosofiskari teori

Vanliga verður ein teori vrakað, tá hon stríður ímóti vídundaligum lógum. Hetta er eisini logiskt. Men evolutiónslæran stríðir beinleiðis ímóti fleiri vísindaligum lógum. Men hví yvirlivir hon so??

Svarið er einfalt. Evolutión hevur sum so einki við vísund at gera, men er ein filosofisk trúarjáttan.

Sum dømi um náttúrulógir ið beinleiðis stríða ímóti evolutiónini kann nevndast:

Lívfrøðin: Tað er ein grundlóg í lívfrøðini, at bert lívrunnin evni kunnu umbroyta ólívrunnið evni til lívrunnið evni. Spurningurin er tí: Hvussu er tann fyrsta lívrunna kyknan vorðin til???????

Alisfrøðin: Onnur termodynamiska lóg sigur, at alt tilfar søkir ímóti kaos. Men evolutiónsteoriin sigur tað mótsatta. Munurin er tann, at øðrumegin hevur tú eina lóg og hinumegin hevur tú eina teori. Men lógin má lúta, tí teoriin er friðhalgað í templi ateismunar.

Informatiónsvísund: Vísindini um hvussu informatión verður móttikin, skrásett, goymd og send víðari byggir m.a. á lógina um, at informatión altið hevur ein avsendara. Men alt organiskt lív er fult av informatión, sum smb. evolutiónsteoriina ikki hevur nakran upprunaligan avsendara.

Um granskarar einaferð í framtíðini finna útav, at evolutión eisini stríðir ímóti tyngdulógini, sum Newton formuleraði fyri 400 árum síðani, so skuldi tað ikki undra, um tyngdulógin eisini hevði verið noydd at givið skarvin yvir í knæfalli fyri evolutiónsteoriini.

Hví trúgva granskarar menningarlæruna?

Ein ørgrynna av granskarum hava vent menningarlæruni bakið av vísundaligum orsøkum. Men kortini er menningarlæran einaráðandi innan undirvísing í stórum parti av heiminum, og alt tað rúgvusmikla vísundaliga tilfar, ið mótsigur menningarlæruni, og sum serliga seinastu 40 árini er komið í ljósmála verður hildin burtur frá undirvísing, av eini akademiskari mafiu, ið hevur tikið definitiónsrættin uppá vísindini.

Men hetta hevur jú sína orsøk. Orsøkin er eitt filosofiskt hugrák "paradigm", har øll vísundalig "prógv" skulu tillagast einum frammanundan bíløgdum úrsliti. Tað sigur seg sjálvt, at tá ein veik teori hevur fingið status sum "vísundaliga prógvað", so fær onkur trupuleikar, tá nðggjar vísundaligar kanningar sáa iva um teoriina. Søgan veit um mong dømi at siga.

Umár 500 "staðfesti" vísundamaðurin Ptolemeus at jørðin var fløt. Hetta var eisini góðkend "vísund" í 1000 ár, tá Kopernikus og Galileo ikki bert settu spurnartekin við hesa gomlu heimsmynd, men enntá prógvaði at jørðin var rund. Men myndin av tí fløtu jørðini hevði skapt eitt "paradigm", ið var vorðið til eina filosofiska og ikki vísundaliga heimsmynd. Nðggj vísundalig avrik høvdu tí einki at siga. Galileo og Kopernikus fingu forboð fyri at útbreiða sína læru, og lærisveinurin hjá Kopernikus, G. Bruno varð brendur á báli í Róm fyri sína trúgv á tað rundu jørðina. Bæði Galileo og Kopernikus fingu trupuleikar við miðaldarkirkjuna, men sum kristnir menn høvdu teir als ongan teologiskan trupulleika av sínum vísundaligu kanningum.

Evolutiónslæran í dag er eisini umgyrd av einum filosofiskum paradigm, sum ger, at hon er óatkomilig hjá sakligari vísundaligari mótstøðu. Hetta er eisini galdandi í føroyska fólkaskúlanum og miðnámsskúlunum, har næmingar, fyri almennar pengar verða heilavaskaðir í aputeoriini, uttan at teir so mikið sum verða kunnaðir um tað ørgrynnu av vísundaligum tilfari, sum beinleiðis stríðir ímóti darwinismuni. Stundum verður sagt, at vísund byggir hesi stig:

- Observatión
- Hypotesir
- Test av hypotesum
- Niðurstøða

Viðv. spurninginum til uppruna og menning av lívi er bert ein hypotesa loyvd - nevniliga evolutión. Alt sum stríðir ímóti hypotesuni verður sáldað frá í lærubókum, og so er niðurstøðan greið. Og hetta rópa summi vísund.

Hugsa vit okkum sama framferðarhátt í eini humanistiskari lærugrein sum t.d. søgu so høvdu vit øll somul uttan at himprast skýrt hetta sum manipulatión og heilavask.

Apan sum tveitti pelsin

Sambært menningarlæruna var ein ættargrein av apunum so "býtt" at hon tveitti pelsin og vit gjørdust eftirkomarar. Hetta var vánalig "menning" tí ein ílatin apa er óivað meira "fit for survival", (fyri at nýta orð Darwins) enn apan uttan pels og uttan kunning um, hvussu ein tekstildnaður kann fáast á føtur. Uttan av fara longur út í ættargransking kunnu vit kortini taka samanum og siga, at vit hava jú tveir naknar keisarar frá 1837. Annar er úr ævintðrinum hjá H.C. Andersen og hin er "skyldfólk" okkara - tær pelsleysu apurnar frá Galapagosoyggjunum - ið er ein karikaturur av filosofiska ævintýrinum um evolutiónsteoriina.

Nei álvaratos! Trúgvin á ein skapara hevur munandi størri vísundaligt kjølfesti enn trúgvin á tilvildina, eksistensiellan tómleika og gudloysi. Biblian royndir ongantíð at prógva, at ein Gud er, men setur heldur ongantíð spurnartekin við hin almáttuga. Hon sigur bert: Dárin sigur í hjartanum: "Eingin Gud er!" Sl. 14,1.

Piff Paff Puff
(til vit(n)andi handilmannin)

"Ein blandaðan pakka av ímorgin, takk!"
"Tað verður 66 kr. takk!"
"Jamen er hetta ikki blandað bomm?"
"Jú men prísurin er dýrka?ur!"
"Nei takk! Tú fært hann fyri hálvan prís!"
"Okey!"

chr.fróði